

www.oljan.fo

**Jan Müller** 26 - 02 - 2013

# Nú eru meiri enn 4.000 mia. í Oljugrunninum

Í gjárkvøldið fór virðið á norska Oljugrunninum upp um 4.000 milliardir norskar krónur. Virðið hevur ligið og togað upp ímóti tí runda talinum í fleiri vikur, og í gjárkvøldið fór tað so uppum. Tað mest avgerandi fyri grunnin er, hvussu virðisbrævamarknaðirnir hátta sær. Hækkar virðið har, veksur virðið á grunninum av sær sjálvum. Men grunnurin veksur eisini, tí í løtuni hevur tann norski staturin ovurstórar inntøkur frá oljuvinnuni. Hvønn mánað fær grunnurin pengar frá fíggjarmálaráðnum í Oslo. Fíggjarmálaráðið sigur, at níggju teir fyrstu mánaðirnar í fjør flutti ráðið grunninum 212 milliardir krónur. Til samanberingar kann nevnast, at í 2011 fekk grunnurin 271 milliardir úr fíggjarmálaráðnum. Tað tók næstan fýra ár, til Oljugrunnurin hevði fingið tær fyrstu 1.000 milliardirnar. Í oktober í 2008 fór virðið upp um 2.000 milliardir, tann 19. oktober í 2010 upp um 3.000 milliardir og so nú, tann 25. februar í 2013, fór tað so upp um 4.000 milliardir norskar krónur.